hjá mammu. Vit høvdu um eina viku yvir á Akureyri. So fór eg við rutubátinum til Siglufjarðar, har mostir mín búði, og har eg havði fingið pláss. Har stóð eitt systkinabarn og tók ímóti mær.

Eg var at vera hjá mostir míni, Guðny, í nakrar mánaðir. Eg róði út við eini trillu, sum teir smáu bátarnir verða kallaðir í Íslandi. Vit vóru tveir mans við. Fyrsta túrin hjá mær var sjaskveður, og vindur var inn á stýriborð. Tað var ringt at kasta boyuna, og tað kundi lættliga fløkja koma í. Eg tók standaran tvørtur um boyuna. So spurdi hann, um eg var vanur at gera so. Tá ið vit drógu aftur var eingin fløkja á standaranum. Hetta var væl umtókt, og tá ið vit komu inn fortaldi formaðurin, hvørja nyttu "færeyingurin" hevði gjørt.

Vit fingu 13.000 pund, tað mesta var toskur og báturin var fullur. Eg hoyrdi meðan vit landaðu, hvussu skiparin fortaldi, hvat eg hevði lært hann. Eg var so ein mánaða við honum.

Hann hevði reypað so, at tá ið eg hevði verið nakrar túrir, kemur ein maður til mín og bað meg kom við einum 50-tonsara, "Anna", hjá teimum. Hesin bátur var tann, sum fiskaði mest á



Hansina og Poul á Oyri saman við børnum

Siglufjørðinum. Eg var ógvuliga glaður og spurdi, um eg mundi fara at klára tað. Jú, tað mundi eg nokk fara at ganga. Hann var grúiliga góður við meg, tað skal hann eiga.

Ofta fingu vit 25 – 30.000 pund um dagin. Tá ið vit landaðu skuldu vit blaka fiskin uppá bryggjuna. Hetta var ov tungt fyri meg. Av bryggjuni skuldi fiskurin í ein vogn við skinnara og koyrast niðan. Hetta orkaði eg væl. So fara vit næsta túrin, og nú fer hann til hús at sova og so avstað aftur. Nú koyra teir meg niður á dekkið at hiva upp. Dóttir skiparan arbeiddi á fiskavirkinum. Hon hevði sæð, at eg var deyðatroyttur og hevði sagt tað við pápa sín. Nú koma vit aftur dagin eftir. Og hann sigur: "Tórhallur hví er tú her." Nei, eg hevði fingið ordar til tað. Tá var hann ikki blíður. Teir høvdu lagt meira á meg, enn hann ætlaði.

Vit vóru fýra menn við bátinum. Tað var egnt í landi. Vit fingu nógvn fisk, og eg tjenti nógvar pengar við har. Vit vóru ofta úti. Tað kundu tær smáu trillurnar ikki.

Her var eg nakrar mánaðir. Tá varð eg biðin um at vera pedellur á sjúkahúsinum.

## Verdandi

Hóast hetta var mitt undir krígnum, merktu vit einki til tað. Tað komu eisini føroyskar sluppir upp higar at keypa fisk. Tá ið Verdandi fórst í 1944 var eg á Siglufjørðinum.

Í samband við frásøgnina um Verdandi kann tað vera hóskandi at endurgeva ta frásøgn um hesa hending, sum finst í ikki alment útgivnu Høgabólsøguna, sum er skrivað av Sverra Joensen um krígssiglingina hjá teimum á Høgabóli.

Tá ið kríggið kom, fóru øll tey trý skipini á Høgabóli at sigla við ísfiski til Bretlands. Tey sigldu bæði vetur og summar. Í 1941 fóru Lizzie og Galathea á land Úti á Skerum í eini ræðuligari ódn, sum var hendan veturin. William Martin, sum reiðarafelagið á Høgabóli reiddi út í mong ár, fór á land úti á Rókini og sakk. Galateha, ið fekk størsta skaðan, var til umvælingar í næstan eitt ár. Øll stýriborðssíðan var brotin. Tryggingin gav hana upp sum vrak.

Men av tí, at ov fá skip vóru, lat Símun hana gera aftur á Tórshavnar Skipasmiðju. Tá ið hon var umvæld og skuldi verða flotað, vildi so illa til, at vognurin, sum hon stóð á, brotnaði, og hon datt niður á bakborðssíðu. Hon brotnaði so illa, at eisini hon mátti verða endurnýggjað øll, sum hon var.

Skipini á Høgabóli gjørdu 55 túrar til Bretlands í alt. Tey seldu



Sethús og handil hjá Poul á Oyri í fimmtiárunum. Her verður vist bíðað eftir mjólkabátinum

fyri 140.709 pund til samans. Tað vóru 3,1 milliónir í okkara peningi. Í nútíðar krónum ein risaupphædd.

## Verdandi fórst helst av veðri

Tá ið kríggið leið at enda, fóru føroyingarnir sjálvir at fiska við sluppunum, og tað var eisini gjørt við skipunum á Høgabóli. Hetta gjørdi eisini at manningin gjørdist størri. Við Verdandi vóru 13 mans, meðan manngin var sjey, tá ið fiskur varð keyptur.

Í oktober 1944 lógu nógv føroysk skip inni á Siglufjørðinum og krokaðu, tí veðrið var so ringt.

Galathea og Verdandi, sum báðar vóru farnar at royna við línu, lógu eisini inni. Túrurin hjá Galatheu var um at vera av. Men Verdandi var júst byrjað, og hon hevði bert havt einar tvær ella tríggjar setur. Av tí, at illveðrið vardi so leingi, og fiskurin var farin at eldast, varð gjørt av, at fiskurin umborð á Verdandi skuldi verða skipaður umborð á Galatheu, sum so skuldi fara til Bretlands við honum. Verdandi skuldi so fara til Akranes, norðanfyri Reykjavík, at keypa fisk uppí lastina.

So ein seinnapart var ein skái. Galathea slapp út og kom til Bretlands í øllum góðum. Dagin eftir var veðrið batnað nakað, men illveður var enn. Tá fór Verdandi av Siglufirði, men hon kom onganttíð vegin fram.

## Var á møti saman við mannningi

Eg minnist, at eg hevði verið á møti kvølddð fyri, sum teir fóru av Siglufjørðinum. Teir sum høvdu møti, vóru Óli, skiparin á Verdandi, og Tummas farbróður, sum arbeiddi á bedingini í býnum. Tað var hildið í einum lítlum sali á Siglufjørðinum. Øll manningin á Verdandi var har. Tað vóru eisini fleiri teirra sum vitnaðu.

Tað vóru ongar rutur til Føroya tá. Tí vóru eisini tveir ferðamenn umborð, sum høvdu biðið um at sleppa heima við. Eg minnist Martin Jacobsen úr Streymnesi. Jakku beiggi Óla hevði verið kokkur, men var blivin sjúkur. Martin hevði verið á elverkinum har uppi og arbeitt. Hann varð so kokkur heim. Jakku var eisini umborð.

## Eg var tann seinastu sum sá manningina

Eg plagdi ofta at vera umborð hjá teimum. Nú fáa teir møguleika at fara á Akranes at fáa fisk. Har kundu teir fáa 40 tons. Tað er langt av Siglufjørðin á Akranes og farast skuldi vestureftir tvørtur um Vestfjarðirnar, sum er tiltikið pláss fyri veður. Eg fylgdi teimum út á oljukajuna, tá ið teir fóru avstað. Teir fóru so, og barometrið var í botni. Kl. 10 um kvøldið brendi hann á við kavaroki. Tað vardi átta samfullar dagar. Einki hoyrdist aftur frá Verdandi. Teir vóru 15 mans við. Tað var grúiligt. Óli í Búrstovu var hiðani. Tað sama vóru Petur og Olaf. Eg kendi teir flestu av monnunum.

Agenturin í Akranesi visti, at teir vóru á veg. Tá ið skipið ikki kom fram tann dagin, teir væntaðu tað, og tað heldur ikki fræ私ttist frá teimum teir fylgjandi dagarnar, gjørdist órógvin størri og størri. Tað varð leitað bæði við flogførum og skipum uttan úrslit, og ein dagin fræ ttist í útvarpinum, at færeyska skútan var gingin burtur. Teir eru helst farnir í Húnaflóðanum.

## Seldi føroysku klæðini áðrenn hann fór avstað

Í somu bók eru fleiri frásagnir sum benda á, at menn høvdu ánilsi, og verður greitt frá hesum í komandi parti.

Skrivarin av hesi røð hevur hoyrt eina aðra frásøgn, sum ber á sama borð. Ein sum fórst við Verdandi var Olivur Mikkelsen úr Syðrugøtu. Hann var ættaður av Lækjuni, men vaks upp Fyri oman Oyruna.

Hann var farin til Íslands at arbeiða, men áðrenn hann fór, hendi nakað sjáldsamt. Hann kemur til Havnar og fostursystir hansara, Petra, sum búði í Havn, sær, at hann hevur eitt kuffert við sær. Hann fer í býin og kemur aftur við ongum kufferti, og Petra fær einki at vita. Seinni fær hon snevilin av, at hann hevði verið á Heimavirkinum og selt sín føroysku klæðir. Hetta var heilt sjáldsamt, tí hetta vóru klæði, sum konufólkini í húsunum, har hann vaks upp, høvdu gjørt honum. Og at fara at selja síni føroysku klæðir var sera óvanligt, næstan óhugsandi. Føroysk klæði var nakað mann hevði fyri lívið.

Olivur fer so avstað, og skal koma heim við einum øðrum skipi enn Verdandi. Tað kann hava verið Galathea. Men av eini orsøk ella aðrari verður hann ov seinur til hetta skip. Men hann er so "heppin", at Verdandi liggur har, og hann sleppur við teimum. Men tá ið ein hoyrir líknandi frásagnir er sera nærliggjandi, at Olivur hevur havt okkurt ánilsi.



Í Tunguni og Garnavirkið á Oyri

## Komandi partur

Í komandi parti verður hildið fram við frásøgn um Verdandi og um sjólívið hjá Tórhalli. Eisini verður frásøgn um tá ið Havfrúgvin forlisti í 1949, og Tórhallur saman við tveimum beiggjum var við.